# t at bíða eftir









plátusáttmál og nógvu konsertirnar, so tykist Jacob sum ein maður, sum megnar at halda bæði beinini á jørðini.

- Eg royni í øllum førum. Um tað gongur illa, so seti eg stikkið í til hann har uppi, greiðir Jacob, meðan hann vendir eygunum uppeftir.

Hann viðgongur tó, at viðhvørt missir hann sambandi við jørðina, men sum heild roynir hann at spyrja um ráð og lurta eftir tí, ið sagt verður við hann.

- Eg veit av royndum, at hetta fer ikki at halda fram. Beint nú vilja øll hava eitt stykki av køkuni, men fyri tað skal eg ikki missa tamarhaldið á mær sjálvum.

- Ein kann siga tað, ein vil um Stjørna í eitt kvøld. At tað er ein kapping og "buh-bæ", men hon hevur púra broytt mítt lív. Eg eri vorðin meira útvendur, og harvið gjørt mínar veiku síður til styrkir.

## Stuðul nógv at siga

Jacob ásannar, stuðul frá familjuni hevur alt at siga í hansara arbeiði. Hann greiðir frá, at fyrstu ferð hann skuldi til upptøkuroynd fyri at vita, um hann slapp at luttaka í Stjørna í eitt kvøld, var tað Rikke, ið fekk hann avstað. Systir Jacob hevði meldað hann til, men tá morgunin kom, har hann skuldi avstað, tímdi hann ikki, tí hann hevði timburmenn. Tá var tað at Rikke bað hann lyfta endan og fara avstað.

- Rikke (unnustan, blaðkv.) hevur stuðlað mær ótrúliga væl. Og eg skyldi henni nógv. Tað royni eg eisini at minna meg sjálvan á.

Hóast hann er nógv heimanfrá, so sigur hann, at tey royna saman at leggja eitt felags familjulív saman við Malte. Tað kann vera torført, men tað er málið.

- Millum annað hava vit lagt ætlanir um eina deiligga feriu, tá konsertferðin hjá mær er liðug í summar. Tað er soleiðis tað skal vera. At hava felags dreymar og felags mál og stremba eftir tí.

## Nýtir tað

Keypmannahavnarin heldur, at av einum tónleikara krevst, at ein er í gongd alla tíðina. Tað verið seg við konsertum og at gera nýtt tilfar.

- Tað er júst hetta, sum eg haldi er so dragandi í hesi vinnuni. Mær dámar at vera skapandi. Eg njóti at skriva sangir. Har er okkurt fordjúpandi við tí, og tað er eitt gott stað at vera.

Sjálvt um arbeiðið kann vera strævið, og tað fylgir nógv ferðing við, so er tað týðiligt, at hetta er júst tað, Jacob brennir fyri. Honum dámar væl at ferðast, men viðgongur tó, at eftir at hava sitið í einum bussi í 16 tímar, so gerst ein sanniliga eisini móður.

- Men um tað so bara eru tvey fólk í salinum, sum eru glað og nøgd, so er tað alt vert, staðfestir hann.

Og tað er eisini ein av orsøkunum, hann tímur so væl til Føroya.

- Eg leggi onki í, um vit skulu flúgva og sigla og koyra. Tað er tað vert!

Ein av dreymum hansara snýr seg eisini um Føroyar, har hann kundi hugsað sær at steðga í eina tíð fyri at skriva, og síðan tikið teir upp í einum studio í Føroyum.

Nú er Jacob júst farin undir ein "center-tour" runt um í Danmark, og síðani skal hann millum annað hita upp saman við Guðrun til stóra tiltakið í Parkini, "Once upon a time" í sambandi við 200 ára føðingardagin hjá H.C. Andersen. Og so síðst í mai mánaði skal hann til Føroya at hava tvær konsertir.

- Og tað gleði eg meg eisini til, sigur Jacob Andersen at enda.